

# Vilja hava morgunlesturin aftur

Leygardagin 7. mars 2009 hevði Felagið fyri kirkjuráðslimir, sum hevur 380 skrásettar limir, aðalfund. Kirkjuráðslimirnir eru fólkavaldir og umboða limirnar í Fólkakirkjuni. Eitt av evnunum, ið limirnir umrøddu á aðalfundinum, var avtøkan av endursendingini av morgunlestrinum kl. 9.50 í útvarpinum. Flestu kirkjuráðslimir hava tosað við lurtarar í øllum aldursbólkum, ið eru keddir av hesi avgerðini og undrast á framferð Kringvarpsins. Grundgevingarnar hjá Kringvarpinum verða hvørki hildnar at vera nóg góðar ella nóg væl undirbygdar. Aðalfundurin heldur tað ikki vera nøktandi, at morgunlesturin verður endursendur í sjónvarpinum, tí ikki øll hava møguleika at hyggja eftir sjónvarpi kl. 9.50. Aðalfundurin hjá Felagnum fyri kirkjuráðslimir heitir tí á Kringvarp Føroya aftur at endursenda morgunlesturin kl. 9.50 í útvarpinum, sigur Felagið fyri kirkjuráðslimir.

# Munandi færri lærlingar

Teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár hava einans 28 handverkslærlingar skrivað sáttmála. Sama tíðarskeið í fjør var talið 67. Fyrraárið var talið av lærligum 73 ársins fyrstu mánaðir. Á heimasíðuni hjá Yrkisdeplinum, www.yrkisdepilin.fo sæst yvirlit yvir lærlingatilgongdina – helst eitt gott konjukturbarometur. Alt árið í fjør skrivaðu 315 lærligar undir sáttmála. Á Yrkisdeplinum siga tey, at um lærligatilgondin í fjør var tann sama, sum árini frammanundan, so hevði talið verið 350.



*Bjørn Patursson, nýggjur búnaðarstjóri á samanlagda stovninum Frammi í Dali í Kollafirði og Ari Johanneson, fyrrverandi stjóri, sum nú er farin í annað starv*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Búnaðarstovan liggur undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, sum her heilsar upp á nýggja búnaðarstjóran, Bjørn Patursson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

hann trúði ikki, at hann fór at fáa hetta starv, fyrr enn hann fekk tað váttað, sum hann tekur til.

Sum skilst, vóru fleiri umsøkjarar til starvið sum búnaðarstjóri, men Bjørn veit ikki hvussu nógv søktu, og hann veit heldur ikki hvør søkti.

Fiskimálaráðið setti ein professionellan starvssetanarbólk við eitt nú umboðum fyri Búnaðarstovuna og Royndarstøðina, sum tók sær av tilgongdini.

- Eg havi skilt, at tríggir umsøkjarar vóru til samrøður við bólkin, sum at enda peikaði á ein persón, sum tey mæltu landsstýrismanninum at seta í starvið.

Bjørn Patursson endurtekur, at hann bæði er ovfarin og erri av, at stjórastarvið á Búnaðarstovuni fall sær í lut.

- Eg fari undir hesa uppgávu við góðum treysti, sigur nýggi búnaðarstjórin í samrøðu eftir móttøkuna fyri honum og hansara starvsfólkum á stovninum seinasta fríggjadag.

## Nýggir festarar

Stjórin á Búnaðarstovuni kann ikki hava annað starv, og av hesi orsøk segði Bjørn formanssessin í Bóndafelagnum frá sær í desember 2008. Somuleiðis fór hann frá sum festari í Koltri 31. januar 2009.

Nýggju festarahjúnini í Koltri eru dóttir Bjørn og Lykku, Malan Patursson og maður hennara, Petur á Dul Patursson.



*Peder T. Haahr (t.h.) hevur síðan 1985 verið stjóri á Royndarstøðini, sum nú er løgd saman við Búnaðarstovuni. Peter verður knýttur at nýggja stovninum, til hann fer frá vegna aldur í summar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*